# 2005

## ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR



# ÍF – KÍ

**FORMULADEILDIN**

**Sunnudagin 3. juli 2005 Kl. 15.00 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

formuladeildin

TOYOTA MIKLAGARÐUR P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 7 2005**

**Útgevari:**
**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**ÍF-stuðlar**

**Ábyrgd**
ÍF-stuðlar

**Blaðnevnd**
ÍF-stuðlar

**Myndir**
Ólavur Frederiksen,
faroephoto.com
Sosialurin
Rógvi Róin

**Kápumynd**
Rúni vinnur bóltin frá
Kenneth Jacobsen, B36.
Poul Ennigarð er til
reiðar at taka ímóti
*Mynd: Ólavur Frederiksen,*
*faroephoto.com*

**Prent**
Estra

**Uppseting**
Sisero 351800

**TAÐ HALDA VIT**

# Vit standa saman

Væl vitandi um, at vit ikki eiga at fokusera alt ov nógv á, hvar vit liggja í deildini í løtuni, tí tað væl kann gera tað heila enn verri, loyva vit okkum aftur hesaferð at varpa ljós á støðuna. Ikki fyri at trýsta leikararnar, venjararnar og hjálparfólk. Nei, heldur fyri at vísa teimum og tykkum, sum eru áskoðarar og viðhaldsfólk hjá liðnum, at nú ræður um at standa saman og venda gongdini. Tað nyttar einki, at vit hvør í sínum lagi hála ymsar vegir.
– Vit skrivaðu um hetta í leiðaranum seinast. Nevnliga at vit hava loyvi til at hava eina meining um tingini, líkamikið hvør hon er. Tað halda vit framvegis, og tað hava vit eisini framvegis, altso eina meining um støðuna.

Úrslitini seinastu mongu dystirnar hava verið alt annað enn nøktandi, og hevur tað í dag við sær, at vit liggja á einum aftasta plássi, eitt stig aftanfyri 4 onnur lið. Verður hugt eftir innsatsinum fleiri av nevndu dystum, er innsatsurin fyri størsta partin í lagi. Tó kunnu vit staðfesta, at í 3-0 tapinum í Gøtu hin dagin varð innsatsurin og spælið vánaligt. Stóri trupulleikin er, at vit gera alt ov nógvar persónligar feilir sum kosta mál; næstan hvørjaferð. Seinast móti B36, sum skorar tvey mál uppá regulerar persónligar feilir. B36 hevur annars bara ein møguleika í dystinum, nevnliga tá ið Fróði verður spældur leysur, men Tórður bjargar meistarliga. – Hin trupulleikin hjá okkum er, at vit ikki klára at skora uppá nógvu kjansirnar, sum vit skapa. Tak aftur dystin ímóti B36. – Sylla hevur tveir 100% kjansir, meðan Magni hevur ein. – Allir triggir eru væl uppspældir.

Tí halda vit, at hvør einstakur leikari eigur fyrst og fremst at hugsa um sína uppgávu á vøllinum og varðveita konsentratiónina alla tíðina hann er á vøllinum. Hetta er sjálvsagt eisini ein uppgáva hjá venjarunum at prenta í leikararnar. Gera teir tað, so vinna vit fleiri dystir!

Annars mugu tit øll hava ein góðan dyst, og eina framhaldandi góða varmakeldustevnu!!






Í sambandi við fyrra dystin ímóti KÍ í Fuglafirði sunnudagin 16. mai, skrivaðu vit um eitt KÍ-lið, sum var í kreppu. Tað eru teir framvegis. Hinvegin eru vit nú tíverri enn verri fyri enn teir. – Vit liggja niðastir, meðan teir eru nr. 6 við bara einum stigi fleiri enn vit. Fyrru ferðina taptu vit heili 0-3, og tað var alt annað enn nøktandi. Men í dag, dreingir, vænta vit, at tit geva klaksvíkingum skarpari gang enn seinast.

Síðani seinasta dyst eru hagtølini móti KÍ ikki vorðin betur. Vit hava nú leikt 25 ferðir ímóti hvørjum øðrum í landskappingini síðani 1980. Á heimavølli hava vit vunnið 2 ferðir, spælt javnt 3 ferðir, og tapt heilar 8 ferðir. Í Klaksvík hava vit vunnið tvær ferðir. – Í 1988 vunnu vit heili 2-4 og á Norðoyastevnu í 1997 vunnu vit 0-1. Dysturin í 1981 í Klaksvík endaði við 1-1, og hinar 9 hava vit tapt.

Til dystin í dag eru fleiri mans ivasamir. Hanus kom inn ímóti B36 seinast, men eftir ein nærdyst næstan beinanvegin, noyddist hann út aftur, tí hann meiddi sær armin. Tað er staðfest, at armurin er ikki brotin, men Hanus hevur ikki vant við fullari ferð hesa vikuna. Tað hevur Rúni heldur ikki. Um tað er snuddurin hann fekk tíðliga í dystinum seinast er ikki vist, men hann hevur ikki vant við restini

Framhald á bls. 5















Framhald frá bls. 3

av hópinum hesa vikuna. Bæði Hanus og Rúni verða væntandi klárir til dystin í dag.

Vit væntaðu, at Gunnar fór at verða klárur til dystin ímóti B36, men tað vísti seg, at skaðin, sum hann nú hevur drigist við í fleiri vikur, ikki var blivin betri. Tí var hann slettis ikki við mánadagin. Gunnar hevur vant fyri seg sjálvan seinastu dagarnar, men fríggjakvøldið var í øllum førum ætlanin, at hann skuldi venja saman við hinum. – Tí kann væntast, at Gunnar ikki verður við frá byrjan í dag, m.a. av tí at venjingarstøðan ikki er 100%. Hinvegin er hann ein góður "jokari" at seta inn. Annars eru allir hinir leikararnir tøkir í dag.

**Broytt uppstilling**

Til dystin í dag verða væntandi broytingar í uppstillingini. – At meta út frá venjingin hesa vikuna verður Bartal í álopinum saman við Sylla, meðan Sìmun verður í miðverjuni saman við Poul. Rúni og Fritleif, sum spældi sum ein brandur á høgra bakki mánadagin, verða ávíkavist í vinstru og høgru. Á sentrala miðvøllinum verða Eyðolvur og Høgni, meðan Magni og Áki ella Hanus verða í síðunum. Út frá spælistílinum og sum dysturin ímóti B36 menti seg, er hetta skilagott. – Mánadagin vórðu nógvir langir og høgir bóltar – helst ótilvitað – lossaðir fram til Sylla, sum nærum einki fekk burturúr

Framhald á bls. 32



Fuglafjarðar Træsmiðja

Snikkaraarbeiði
• Vindeygu
• Úthurðar
• Trappur
• Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

Fuglafjarðar Træsmiðja
við Jóhan Larsen

fk
Fuglafjarðar
Keypsamtøka
Tel. 444 095 - 444 495 Fax 444 895

FAXE KONDI



## Hjalmar Joensen 75 ár

# ELDSÁL ELDIST




*Áðrenn dystin ímóti B36 handaði liðskiparin hjá ÍF, Bartal Eliasen, Hjalmari eitt blómutyssi*

Fuglafjarðar Ítróttarfelag hevur altíð átt eldsálir millum sínar limir, ið felagið ikki kundi verðið fyri uttan. Ein av hesum er Hjalmar Joensen, sum tann 26. juni fylti 75 ár. Aldur sæst ikki á honum, líka fattur og spelkin, sum vit kenna hann. Er hann í Fugalfirði, tá ið dystir verða leiktir, so er lætt at finna Hjalmar – hann er við fótbóltsvøllin, líka eldhugaður sum fyrr.

Í mong Harrans ár var Hjalmar formaður í ÍF, har hann legði alla sína orku í at felagið fekk góð úrslit. ÍF leikarar, sum nú eru komnir nakað upp í árini, minnast serliga væl ferðirnar, ið vórðu gjørdar til Íslands, har leikt varð móti fleiri íslendskum liðum. Fyrsta ferðin var í 1966, tá ið vit leiktu 6 dystir, vunnu teir fýra og taptu tveir. Ta ferðina spældu vit móti Akranesi, ið spældi í bestu deildini í Íslandi og mín sann um vit ikki vunnu á teimum. Frøin var stór hjá ÍF, meðan leikararnir á Akranesi vórðu fyri ongum, slíkt vóru teir ikki vanir við.

Aftur í 1973 varð farið til Íslands at spæla. Ta ferðina varð farið við Ólavi Halga. Siglt varð í fínasta veðri, og manningin á Ólavi Halga vartaði okkum væl upp, sum umborð á ferðamannaskipi. Ein túrur, ið seint verður gloymdur.

Fótbóltsúrslitini ta ferðina, vóru eisini góð.

Íslendingar vóru, sum altíð, sera gestablíðir, og vinaløg, ið tá vóru skapt, hava hildið sær síðan.

Nógv annað kundi verðið nevnt, men nóg mikið á hesum sinni.

Nevnd ÍF´s, spælarar og áskoðarar, ja øll viðhaldfólk felagsins fara at ynskja tær hjartaliga til lukku við teimum 75 árunum, samstundis sum vit takka tær fyri tað tú hevur avrikað fyri ÍF.

# LEIKARIN HESA FERÐ TÓRÐUR THOMSEN

**TÚ**
**Navn:** Kristian Kári Tórður Thomsen (Spyr ikki meg, spyr foreldrini..)
**Føðingardagur:** 11.06.86
**Starv:** Gangi í skúla á Kambsdali
**Hædd og vekt:** Eg eri 191cm langur, og vigi 85 kg.
**Størsta styrki:** Positivur persónur
**Størsti veikleik:** Iltsintur á vøllinum
**Torførast mótstøðumaður:** Higartil man tað nokk vera Fróði Benjaminsen
**Frítíðarítriv:** Lyfti vektir, Sjónvarp, teldu og hangi út saman við vinunum hjá mær ;)
**Vónir fyri 2005:** Við ÍF vóni eg, at vit enda nr. 3 í landskappingini, og vinna steypakappingina - og so kann man siga aftaná: "Ja, vit høvdu eitt ELENDUGT kappingarár!" Við NSÍ vóni eg, at vit (unglingar) vinna steypafinaluna, sum vit skulu spæla 29. juni, og vinna landskappingina! 3 gull og eina bronsu, tað er ikki so galið!

**TÍN ÍTRÓTT**
**Pláss á vøllinum:** Málmaður
**Fyrsti dystur á 1. liði:** Tú, nú má tað fara at vera nøkur ár eftir hondini, tað var tann 27. juni í 2005, minnist meg rætt
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Ja, tað var tann 27. juni í 2005
**Aðrar ítróttargreinar:** Eg spældi hondbólt fyrr, um tað er tað tú meinar! :) Slapp á 1. deild sum 15 ára gamal, meeen nokk um tað :)
**Minningarríkasti dystur:** Tað man nokk verða dysturin millum ÍF og B36
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Er hann nevndur er hann kendur, Jens Martin Knudsen
**Besti fótbóltsleikari:** Í løtuni man tað nokk vera Ronaldinho
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Kappróður
Hvat slag av venjing dámar tær best: Harða venjing við nógvum intensiviteti
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Restoratión venjing



**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Tórður Thomsen - Cafu, Rio Ferdinand, John Terry, Ashley Cole - Cristano Ronaldo, Zinedine Zidane, Frank Lampard, Ronaldinho - Adriano, Wayne Rooney

**TÍNIR FAVORITTAR**
**Matur og drekka:** Pizza, Shawarma, Burgari og Faxe Kondi
**Besta árið og hví:** Best árið man vera í 2001, tá Bin Ladin... Tvætl! Latum okkum bara siga 2005, tí tá fekk Tórður sín fyrsta 1. deildar dyst :)
**Slag av tónleiki:** Tað er so nógv, alt frá Backstreet Boys til West Life, hihi
**Besta sending í SvF:** 3-2, avgjørt!
**Besti filmur:** White Chicks er øðiliga stuttligur
**At slappa av:** Á strondini á Hawaii, tá sólin bakar niður á mín brúna kropp :)
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Diego Maradona, einasti spælari sum vann dystir sjálvur
**Stuttligasi persónur:** Jonhard Hansen, liðleiðari hjá NSÍ
**Sjónvarp/filmstjørna:** Jim Carrey og Wayans beiggjarnir










KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til fiskivinnuna, alivinnuna, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna. Í okkara úrvali av útgerð finst m.a. trolspøl, kranaspøl, marinekranar, lastbilakranar og gravimaskinur. Í okkara stóru eykalutagoymslu hava vit hydraulikkfittings, slangur, rør, pumpur, motorar, ventilar, koblingar, tetningsringar o.m.a.





- Spøl
- Kranar
- Hydraulikklutir
- Filtur
- Aliútgerð
- Katamaranar

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

P.O. Box 110 á Kambsdalur · Tel +298 444 170 · Fax +298 444 265 · info@kj-hydraulik.com · www.kj-hydraulik.com



**PLÁTUVERKSTAÐIÐ**
v/ Glenn Perdomo

Undir Krákugjógv 5 Kj.,
Tórshavn tel 321778

**KUNNINGARSTOVAN Í FUGLAFIRÐI**
INFORMATION OFFICE

*Opið:*
*Mánadag - fríggjadag kl. 9-12 og 13-17*
*Leygardag kl. 9-12*

FO-530 Fuglafjørður
Tlf. (+298) 44 48 60 - Fax (+298) 44 51 80
t-post: infoey-f@post.olivant.fo

**FUGLAFJARÐAR BÓKASAVN**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 44 47 45 - Fax 44 51 80
t-post: bokasavn@atlantic.fo

*Opið:*
*Mánadag - fríggjadag kl. 9-12 og 13-17*
*Leygardag kl. 9-12*




Landsins **størsta** og besta úrval



graveriṅg írokuað prísir

FA EILIF ARGE




Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

**formuladeildin**



í altjóða kapping....

**formula.fo**



**HAVSBRÚN**

Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

**Lastvognskoyring**



Øll lastvognskoyring verður gjørd

**Kári Zachariassen**

530 Fuglafjørður
tel 444 245 ella 217 245

**BERGFROST**
COLD STORAGE

P. O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 44 46 11
Fax +298 44 46 07
Mobile +298 22 36 67
bergfrost@bergfrost.com



# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttura og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo



**Rasmus Joensen**
Málarameistari
530 Fuglafjørður
Tel. 444 139 - 214139

**SANDGREVSTUR P/F**
Norður í Gerði 7
530 Fuglafjørður
Stovnað 1949 - reiðarí innan frakt- & sandbátar

- Norskur stoypisandur
- Hvítur stoypiskervur
- Hvítur skervur til tún
- Reyður skervur til tún
- Fø. stoypi- og pussisandur
- Rall
- Sandblásisandur
- Betongflísar

Koyring við kranalastvognum
fyri fastar prísir (eisini til Tórshavnar)
tel 444121 • 595900 • 595910



**Tannlæknastovan**

Steintór Larsen | tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge | tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358






**Fysioterapiviðgerðarstova**

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Ítróttarhjálparútgerð við lágum prísum: t.d. tape, eingangs ís-posar og 1. hjálpar-/ "læknataskur"

Álvur Hansen, fysioterapeutur







**LEVI'S® RED TAB® JEANS**



Klæði til hennara,
hansara og børnini
- nu lat undir somu lon

**VØRDSLAN WEARHOUSE**

Í Støð 6, Fuglafjørður, tel 44 47 47



AVENSIS

TOYOTA




**Avensis**
Einastandandi dygd og koyrigleði.

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F

VOLVO
RENAULT
VR BILAR







Teir nýggju Volvo S40 og V50
Prísir úr **276.000**

**VR-Bilar**

Hoyvíksvegur 61
FO-100 Tórshavn
tel 32 21 10
telefax 32 21 11
vr-bilar@vr-bilar.fo

Vit umboða eisini Volvo lastbilar, bussar og entreprenørmaskinur

**Opið er soleiðis:**
mánadag til fríggjadag: 08.00-17.00












AP BUSSKOYRING
v/ Andreas Poulsen
fartel 505220 • 441720









Persónsvognur úr kr. **313.291,-** v. mvg
Vøruvognur úr kr. **247.571,-** v. mvg

Skaðaumvæling av øllum bilsløgum
á Hjalla FO-180 Hoyvík Tel 311013 www.kollsker.com

**Bilverkstaðið**
**v/ Hans J. Kollsker**







Vit hava stórt úrval av gløsum, serviettum, dúkum, ljósum og einnýtisborðbúnaði.
Ert tú í iva um mongd, lit ella støðd, ráðgeva vit tær fegin. Vit taka óásettar pakkar aftur.

*Brúðleyp Dóp Veitslu*
*Merkisdag Meistaraheit*



th-dam@post.olivant.fo

Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00



Jørleif Petersen
*málarameistari*
Fuglafjørður
tel. 444 395 fartel. 214 395

Alt málaraarbeiði verður gjørt!

Sp/f
**Jan Mohr**
**Byggivirkið**

**Tlf: 21 99 49 • 21 89 49**


Hugsar tú um at byggja?
Tosa fyrst við okkum!
Her fært tú altíð eitt gott tilboð
Element-& Betongvøruvirkið
við Gjógv
Tlf. 423173-445173


Hugsa tygum um útskifting ella nýbygging? - royn okkum!
Vel snið, træsort og viðgerð
Send okkum uppskot og vit geva tilboð innan allar seruppgávur
Handverkið ger munin
TRÆSMIÐJAN
317166 GLT
Tórshavn • Tlf. 317166 Faks 318131 • Teldupostur: tra-glt@post.olivant.fo


døgg
.alt innan nýmótans hárviðgerð.
Halla Olsen
tlf. 219379
tlf. 445550
opið er:
mán - frí 10 - 17
hósdag 10 - 19
leygardag 10 - 14
Toftavegur 1 · 530 Fuglafjørður · tlf. 44 55 50


Jolly®


Hann ger tað ikki lættari at minnast kotuna á bensinkortinum
Tann nýggi Suzuki Alto koyrir í meðal 20,4 km. uppá liturin
Hann kostar bert:
Kr. 99.990,-
koyriklárur
Suzuki Alto er harafturat fyltur við útgerð so sum powerstýring, dupult airbags, ABS-bremsum, sentrallás, el-rútum
SUZUKI Berg Motors SUZUKI
Staravegur 1-3, box 1039, 110 Tórshavn - Tlf 313535 Fax 317735

KLAKSVÍKAR AUTOLAKERING

BUMSHAMAR • 700 KLAKSVÍK • TLF. 458787 • FART. 223512 & 223513

## Timbur-, betong- og jørðarbeiði

**H.K.J. byggivirkið SpF**
Postmoga 40
530 Fuglafjørður
Tel. 21 86 96 og 22 77 99
Fax 44 46 56

# POUL JOENSEN

## LAST & KRANAVOGNSKOYRING

- Last & Kranavognskoyring
- Mini Gravimaskinur
- Mini Lessari
- Útgrevstur við Brøyt
- Betong & Asvaltsaging
- Og mangt annað

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95







# P/F Petur Larsen

## Mekaniskur verkstaður

postboks 64
530 Fuglafjørður
tel. 444 174
fax 444 285
al@online.fo

BAADER®

fomaco



Saman eru vit tryggari...
Ikki bara tryggingar - men eisini trygd
TRYGD




Rokoko
NORÐRAGØTA | TEL 44 10 39




P/f Sveisingahandilin
Myklinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 311909




SEND VARM TIL 1441
og vinn hópin av góðum vinningum
10,-
+ SMS TAKST
TVÆR HP - TELDUR
FRÁ COM-DATA
2X
TØM HANDILIN
HJÁ HARALDSEN Í 3. MIN.*
*) í mesta lagi eitt av hvørjum slag.
NOKIA
NOKIA 6230
2X VIÐSKIFTAKORT FRÁ SHELL
2X TELEVARPSMÓTTAKARAR
GÁVUKORT Á 1500 KR. FRÁ TIMBURHANDLINUM Í FUGLAFIRÐI
STEREOANLEGG FRÁ FØROYA KEYPSAMTØKU
GÁVUKORT Á 500 KR. FRÁ PROFA FARVUM Í FUGLAFIRÐI
GÁVUKORT Á 500 KR. FRÁ VØRÐSLUNI
GÁVUKORT Á 500 KR. FRÁ KATO
VARMAKELDUSTEVNAN 1.-3. JULI 2005
FØROYA TELE
KATO
HARALDSEN
VØRÐSLAN WEARHOUSE
COM-DATA P/F



Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

**Úrvalsbilar SpF**
v/ Magnus Onghamar

Bakkavegur 530 Fuglafjørður tel 444 943 fax 444 638

**Rasmussen & Weihe P/f**
statsaut. grannskoðarafelag

Heiðavegur • P.O. Box 154 • FO-600 Saltangará
tel 35 17 00 • fax 47 17 01
rasmussen@rasmussen.fo
www.rasmussen.fo

International: An associate firm of **PricewaterhouseCoopers**

**P/F Grannskoðaravirkið**

**INPACT**
**Statsaut. revisorar**

**R. C. Effersøesg. 26, Tórshavn**
**Tel +298 31 47 00**
**Fax +298 31 38 15**
**inpact@inpact.fo**
**www.inpact.fo**

**BREYÐMOLIN**
**530 Fuglafjørður • Telefon 444388**



# HER SÆRT TÚ, HVÍ TANN NÝGGI NISSAN ALMERA EITUR DELTA TIL EFTIRNAVN




**DELTA MERKIR ØKING.** Og tað kann veruliga ikki fáast meiri útgerð í Almera Delta. Hóast hetta kostar Almera Delta 1.8 við 5 hurðum bara **189.000,- kr.**

**3 ára** mekaniskt garanti.
**3 ára** lakk garanti.
**12 ára** garanti ímóti gjøgnumtæring

NISSAN

**P/F Meinhardt Arge**
Tel 345400 • www.bilarge.fo

Bilurin á myndini hevur eykaútgerð. Brennievnisnýtsla við blandaðari koyring: 14.9 km/l, CO2 útlát 160 g/km

BOCCA / petur & petur • 320870

## Lítla sølubúðin í ítróttar-húsinum

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. liðnum, eru aftur í ár til dystin fús, sjálvt um umstøðurnar eru avmarkaðar. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til nakað eftir dystin.

Sjálvt um hølisviðurskiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisini í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjaran fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin. So verið vælkomin øll somul.

Framhald frá bls. 3

teimum. Hansara styrki er skjótleikin og tekniski førleikin, og við at hava Bartal í álopinum, kann væntast, at Bartal vinnur luftbóltarnar, og kann spæla Sylla leysan. Og so er at vóna, at neyv- og frekleikin hjá Sylla og hinum í álopssinnaðu monnunum verður størri.

Um hetta verður endaliga uppskriftin er bara git. Í skrivandi stund eru tað helst bara venjararnir, sum vita, hvussu spælstílurin kemur at verða, og hvørjir leikarar verða á hvørjum plássum. Fyri so vítt er tað eisini líkamikið, bara teir, sum eru inni gera ein innsats og lata verða við at gera persónligar feilir. Í bestu deildini kosta teir, og tað veit nokk eingin betur enn vit.

Drívið á dreingir, og fara vit á bakkanum í dag at gera okkara fyri at úrslitið verður til okkara fyrimun. Góðan dyst.







# ÁRSINS ÍF-ARI 2005

## POUL BESTUR ÍMÓTI B36

Í móti dystinum móti B36 mánadagin vóru rættiliga nógvar atkvøður. Poul fekk nógv flestu atkvøðurnar, meðan hinar vórðu væl býttar millum hinar leikararnar. Poul fekk heili 61 atkvøður, og liggur nú á einum samlaðum 2. plássi, 33 stig aftanfyri Eyðolv.

Fyri at verða besti leikarin fær Poul ein sunnudagsdøgurða fyri tvey á Restaurant Muntra.



Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddina í Ítróttarhúsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.

### Støðan

| Leikari | Seinast | Íalt |
|---|---|---|
| Poul | 61 | 130 |
| Eyðolvur | 32 | 163 |
| Høgni | 20 | 63 |
| Rúni | 19 | 54 |
| Atli | 17 | 25 |
| Símun | 16 | 120 |
| Fritleif | 12 | 14 |

## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

EILIF ARGE

Restaurant Munta letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár

Restaurant Muntra

Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Keypssamtøkuni

fk

## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-KÍ, 3. juli 2005

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst. Besti leikarin verður kunngjørdur í komandi leikskrá

Nr 1 (5 stig) ______

Nr 2 (3 stig) ______

Nr 3 (2 stig) ______

Veljari / tel: ______



## STØÐAN FORMULADEILDIN - 24. JUNI

| | Lið | D | V | J | T | V - T | S | Heima | Uti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 14 | 8 | 5 | 1 | 20 - 6 | 29 | 4 - 3 - 1 | 4 - 2 -0 |
| 2 | HB (m) | 14 | 8 | 2 | 4 | 35 -16 | 28 | 6 - 0 - 1 | 2 - 2 -3 |
| 3 | Skála | 14 | 7 | 5 | 2 | 29 -16 | 26 | 4 - 2 - 1 | 3 - 3 -1 |
| 4 | NSÍ | 14 | 5 | 6 | 3 | 21 -17 | 21 | 3 - 3 - 0 | 2 - 3 -3 |
| 5 | EB/Str. | 14 | 4 | 6 | 4 | 15 -22 | 18 | 1 - 5 - 0 | 3 - 1 -4 |
| 6 | KÍ | 14 | 4 | 2 | 8 | 21 -26 | 14 | 2 - 0 - 4 | 2 - 2 -4 |
| 7 | GÍ | 14 | 4 | 2 | 8 | 18 -24 | 14 | 1 - 1 - 4 | 3 - 1 -4 |
| 8 | TB (u) | 14 | 3 | 5 | 6 | 13 -21 | 14 | 2 - 3 - 1 | 1 - 2 -5 |
| 9 | VB | 14 | 4 | 2 | 7 | 14 -22 | 14 | 3 - 1 - 5 | 1 - 1 -2 |
| 10 | ÍF | 14 | 3 | 4 | 7 | 16 -31 | 13 | 2 - 1 - 4 | 1 - 3 -3 |

## LEIKARAHAGTØL FORMULADEILDIN 2005

| | Leikari | Min | D | Ut | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Allan Joensen | 939 | 11 | 1 | - | - | - | (22) | 100 |
| 2 | Áki Petersen | 156 | 5 | - | 4 | - | - | - | 33 |
| 3 | Sverri Ellingsgaard | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 5 | Poul Ennigarð | 1.170 | 13 | - | - | 1 | - | 1 | 130 |
| 6 | Bartal Eliasen | 914 | 12 | - | 2 | 4 | - | - | 60 |
| 7 | Bárður á Lakjuni | 28 | 3 | - | 3 | - | - | - | - |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 784 | 11 | 3 | 2 | 3 | - | - | 14 |
| 9 | Atli Petersen | 173 | 8 | 1 | 10 | - | - | 1 | 25 |
| 10 | Hanus Eliasen | 740 | 12 | 6 | 3 | - | - | - | 36 |
| 11 | Eyðolv Petersen | 968 | 11 | 1 | - | 1 | - | - | 163 |
| 12 | Gunnar Nielsen | 903 | 12 | 5 | 2 | 1 | - | 3 | 117 |
| 13 | Roy Róin | 25 1 | - | 1 | - | - | - | - | |
| 16 | Emil Toftegaard | 51 1 | - | 1 | - | - | (1) | - | |
| 17 | Høgni Zachariassen | 1.170 | 13 | - | - | 1 | - | 2 | 63 |
| 18 | Rúni Eyðunsson Eltør | 903 | 11 | 6 | - | 2 | - | 2 | 54 |
| 19 | Frank Poulsen | 90 1 | - | - | - | - | - | - | |
| 20 | Sylla Amed Davy | 1.017 | 13 | 6 | 1 | 1 | - | 1 | 60 |
| 21 | Jonn Sólheim Thomsen | 552 | 7 | 1 | - | 3 | - | - | 7 |
| 22 | Jákup Helgi Egholm | 90 | 1 | - | - | - | - | (3) | - |
| 23 | Tórður Thomsen | 90 | 1 | - | - | - | - | (2) | 11 |
| 28 | Magni á Lakjuni | 937 | 13 | 3 | 4 | - | - | 3 | 40 |
| 30 | Símun Eliasen | 1.170 | 13 | - | - | 4 | - | 1 | 120 |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

### VERT AT VITA

Í dag spæla vit botndyst ímóti klaksvíkingum. Seinast teir vitjaðu var sunnudagin 16. mai. Tá vunnu klaksvíkingar 0-3. Vit hava fingið eitt stig síðani tá, meðan KÍ hevur fingi 6 stig. Tí er støðan fyri okkara viðkomandi enn verri enn tann dagin. Í dag skulu vit vinna, tí annars sær rættuliga svart út, sjálvt um tað er tætt í botninum. Vit hava liðið til at vinna, tað sóu vit mánakvøldið ímóti B36. Men hepnið og marginalarnir eru ikki við okkum, og so geva vit eisini mótstøðuliðnum ov nógvar kjansir.

Mikudagin komandi kl. 19.00 spæla vit aftur í Fuglfirði. Tá er 1. hálvfinala í kappingini um Løgmanssteypið, og eru tað tá toftamenn, sum koma at vitja. Teir liggja nr. 1 í 2. deild, og hava eitt fínt lið, ikki minst nú teir hava fingið góðan styrk í John Petersen.

Sunnudagin komandi spæla vit ímóti HB í Havn

### Aðrir dystir í Formuladeildini í dag – 15. umfar

ÍF – KÍ
Skála - NSÍ
GÍ - TB
B36 – EB/Streymur
VB - HB

### Dystir í Formuladeildini sunnudagin 10. juli – 16. umfar

EB/Streymur - GÍ (spældur leygardagin 9. juli)
KÍ – B36
HB - ÍF
NSÍ - VB
Skála - TB

### Dystir í kappingini um Løgmanssteypið mikudagin 6. juli – 1. hálvfinala

ÍF – B68
(dómari: Petur Reinert)
B71 – GÍ
(dómari: Birgir Sondum)

### Málskjúttar formuladeildin

| | |
|---|---|
| Súni Olsen, GÍ | 9 |
| Bogi Gregersen, Skála | 8 |
| Tór Ingar Akselsen, HB | 7 |
| Allan Mørkøre, B36 | 7 |
| Rúni Nolsøe, HB | 7 |
| Heðin á Lakjuni, KÍ | 7 |
| Jónhard Fredriksberg, Skála | 6 |

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

| | |
|---|---|
| 1 | Allan Joensen |
| 2 | Áki Petersen |
| 3 | Sverri Ellingsgaard |
| 5 | Poul Ennigarð |
| 6 | Bartal Eliasen (liðsk.) |
| 7 | Bárður á Lakjuni |
| 8 | Fritleif í Lambanum |
| 9 | Atli Petersen |
| 10 | Hanus Eliasen |
| 11 | Eyðolvur R.-Petersen |
| 12 | Gunnar G. Nielsen |
| 16 | Tórður Thomsen |
| 17 | Høgni Zachariassen |
| 18 | Rúni Ey. Elttør |
| 19 | Frank Poulsen |
| 20 | Sylla Amed Davy |
| 28 | Magni á Lakjuni |
| 30 | Símun Eliasen |

**Venjari:**
Petur Simonsen
**Hjálparvenjari:**
Sonni Jensen
**Liðleiðarar:**
Høgni á Lakjuni
Símun Fornagarð
**Fysioterapeut:**
Álvur Hansen

## KÍ-LIÐIÐ

| | |
|---|---|
| 1 | Kartin Joensen |
| 3 | Leon Bjartalíð |
| 4 | Jan Andreasen |
| 5 | Niclas Niclassen |
| 6 | Arnold Joensen |
| 7 | Høgni Madsen |
| 8 | Julian Samuelsen |
| 9 | Heðin á Lakjuni |
| 10 | Hjalgrím Eltør |
| 11 | Atli Danielsen (liðsk.) |
| 15 | Tórur Lervig |
| 16 | Mathias Samulesen |
| 17 | Erling Fles |
| 18 | Eyðun Klakstein |
| 19 | Ovi Nysted |
| 20 | Kristoffur Jacobsen |
| 21 | Sigmund Jacobsen |

**Venjari**
Oddbjørn Joensen
**Hjálparvenjari**
Leif Olsen
**Hjálparfólk**
Thom Jacobsen
Fríðin Ziskason
**Fysioterapeut:**
Jóngerð Biskupstøð

formuladeildin



**GEORG RESMUSSEN**
**Regin og Jónleif**

**PETUR LARSEN**